Álit

í

løgtingsmáli nr. 27/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar (Broyting í áseting um lønarendurgjald til lærupláss)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð 6. oktober 2023 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 25. oktober og 1. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Handverksmeistarafelagið, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Broytingin í lógini um yrkisútbúgvingar er ein liður í trípartasemjuni, sum varð gjørd í 2019 millum Føroya landsstýri, Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag og Landsfelag Handverkaranna/Føroya Handverkarafelag/Starvsmannafelagið/S&K Felagið.

Semjan bygdi millum annað á, at lærlingaskipanin skuldi endurskoðast, og at ein konjunkturjavnandi politikkur skuldi gerast.

Ítøkiliga lógaruppskotið er átak nummar níggju í semjuni, sum er um lønarendurgjald. Verandi skipan er tann, at lærupláss fáa 75% av lønarútreiðslunum endurgoldnar í tíðarskeiðinum, sum lærlingurin er í skúla, ið hoyrir til læruna. Uppskotið leggur upp til, at lønarendurgjaldið verður 60% um arbeiðsloysið er 3,5% ella lægri og 90% um arbeiðsloysið er omanfyri 3,5%, sum avtalað í semjuni frá 2019.

Ger ein fyritøka ein sáttmála við ein lærling, er hann galdandi alla lærutíðina. Tað merkir, at um ein sáttmáli verður gjørdur, tá arbeiðsloysið er niðanfyri 3,5% og tað síðan fer uppum, broytist upprunaliga lønarendurgjaldið ikki.

Undir hoyringunum í nevndini er komið fram, at tað kann gerast ein øktur váði hjá smærri fyritøkum, ið ikki hava uppgávur meir enn nakrar mánaðir fram í tíð, og har inntøkurnar eru óvissar, at taka lærlingar inn, verður uppskotið samtykt. Millum annað tí tær kunnu gera ein sáttmála við einum lønarendurgjaldi uppá 60% um arbeiðsloysið er lágt, men um so arbeiðsloysið veksur og uppgávurnar fækka, økist lønarendurgjaldið ikki.

Hetta kann verða rætt, men havast skal eisini í huga, at semja er gjørd við arbeiðsmarknaðin um hesa broyting. Millum annað tí mann ynskti at hava konjunkturjavnandi skipanir. Henda ítøkiliga broyting skal verða við til at tryggja, at tað eisini er eggjandi hjá fyritøkum at taka lærlingar inn, tá arbeiðsloysið er lutfalsliga høgt og lønarendurgjaldið hægri. Tað merkir so eisini, at endurgjaldið er

lægri, tá tíðirnar eru góðar, men tá eru inntøkurnar gjarna tað hægri eisini og ráðini betri. Tí átti hetta alt annað líka at viðført, at tað verður ein støðugari inntøka av lærlingum, og at fyritøkur ikki eiga at setast aftur at seta lærlingar, tá tíðirnar versna.

Sum sagt er uppskotið ein partur av eini størri trípartasemju, og tað er rætt, at semjan átti at verið viðgjørd í síni heild og sett í verk í síni heild. Tað er tó ikki gjørt higartil, og tað er heldur ikki so, at málini í semjuni hanga óloysiliga saman. Sumt í semjuni er gjørt, sumt er ikki. Tí er einki, sum forðar fyri, at eisini hetta uppskotið kann samtykkjast. Meirilutin heldur tó, at landsstýrisfólkini, sum varða av trípartasemjuni, eiga at taka hana fram aftur og fullføra hana í síni heild. Tað hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum eisini sagt, at hann ætlar.

Arbeiðsloysið er í løtuni lægri enn 3,5%. Tað merkir, at verður uppskotið samtykt, sparir tað landskassanum umleið eina millión krónur á fíggjarlógini fyri 2024. Tó skal sigast, at tann sparingin ikki er vaksandi ár um ár, tí fer arbeiðsloysið uppum 3,5%, hvur broytingin meirútreiðslur við sær fyri landskassan.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni) metir tað ikki vera rætt at samtykkja uppskotið í verandi støðu.

Undir hoyringunum í nevndini er komið fram, at tað er bæði undarligt og óvirðiligt at koma við júst hesum uppskoti nú. Ført hevur verið fram, at heldur enn at taka og pilka ávís punkt úr trípartasemjuni, sum kunnu spara landinum nakrar krónur, átti politiska skipanin at hugt eftir, hvussu man kann vera við til at virða gjørdu semjuna í síni heild.

Víst hevur eisini verið á, at tað, at føra júst fyriliggjandi broytingar út í lívið uttan at taka aðrar tættir í trípartasemjuni við, fer m.a. sannlíkt at gera tað minni eggjandi hjá læruplássum at taka inn lærlingar – kanska serliga hjá smærri vinnurekandi.

Minnilutin heldur, at tað er neyðugt, at landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum tekur upp málið í samráði við hinar partarnar í avtaluni fyri at seta út í kortið soleiðis, at allir partar kenna seg virdar og hoyrdar.

Fyriliggjandi uppskot, hóast tað er nevnt sum eitt átak í trípartasemjuni, ber brá av at vera – um enn lítil og spinkul – hóast alt ein funnin fressur til eina sperda fíggjarstøðu. Minnilutin metir tó, at her er meiri at missa fyri minni, tí lógarbroytingin fer at seta kílar í samstarv og stev við viðkomandi partar.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 21. november 2023

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	